


# Play it again, Sam

SAMFERÐSLA. Álitið í Vestmannasundið hevur í fjóringsøld leikt sama lag. Hóast tað styttist til fátónaða sveiggið millum Vestmanna og Oyrargjógv fer í søguna, nervar tað ikki manningina á strandfaraskipinum Sam

*Høgni Mohr*

*Darr, duggidugg, bumm!* Og umaftur hinvegin; *darr, duggidugg, bumm*.

Sam spælir sama lag, nógvar ferðir um dagin, hvønn dag. Og byrjanin er altíð hin sama:

Dekkið darrar og døkki dieselroykurin stendur úr skorsteinunum, tá ið skrúva verður sett á teir báðar motorarnar.

Undirsjóvartunnilin er enn bert eitt eiti, og sum áður eru tær 660 hestakreftirnar undir tronga bildekkinum álitið. Flestu føroyingar hava kent darranina frá íkoblingini fara upp ígjøgnum nýpussaðu svartaskógvarnar og nakað væl niðan um kníggja. So kanska er tað ikki løgið, at fá hava givið sær stórvegis far um hana annars.

**Onki ósamljóð**
Kvíkvíkingurin, Tummas Marni Joensen, stjórnar hestakreftunum í Vestmannasundi. Hann er einsamallur maskinmeistari umborð á Sam. Í roynd og veru er hann starvssettur umborð á nýggju Ternuni, men royndirnar umborð á Sam eru drúgvar.

– Vit eru á forsíðuni á bløðunum beinanvegin, tá ið hóttafall kemur á. Tað áliggur mær at kenna trupulleikarnar, áðrenn teir gerast veruligir trupulleikar, tí skipið *skal* sigla, sigur kvívíkingurin, ið alla tíðina kennir spenningin av, hvussu neyðug motormegin á Sam er, um sleppast skal undan ósamljóði í føroyska samferslukervinum.



Tummas Marni Joensen, røkjutur maskinmeistari:
– Fólk, sum ferðast dagliga, fara at sakna Sam og tað sosialu samveruna, sum øll skríggja eftir í dag. Vit hava minni og minni tíð, so vit trongja til Sam...
Tummas Marni ivast ikki í, at saknur verður í kaffiprátunum, tá ið gjøgnumtrekkur verður undur sundinum.
– Soleiðis broytist alt. Men vit noyðast at liva í okkara samtíð. Hetta er liður í framburðinum og samfelagsmenningini.
Tummas Marni helt 20 ára starvsdag á Strandferðsluni í januar.
Mynd: Jens Kristian Vang

**Passað og pussað**
Og hjartað og æðraskipanin umborð á Sam hava tað gott. Fyri tað kundi ein stigi skóleysur inn í maskinrúmið. Dúrkið er reint og nýmálað, og góðu gomlu Grenaa motorarnir skína í vónríkum ljósagrønum. Í stýriborði stendur einsamalli Volvo Penta motorurin til bógskrúvuna, ikki minni snøggur og vælhildin. Øll koparrørini eru blonk sum nýpussað skreyt, og amboðstalvan er fullkomin.

Á el-talvuni frammi á skottinum eru nógvir knappar; har ímillum eisini neyðavbrótarin til 24 volts kaffimaskinuna í messuni.

Hann verður valla rørdur. Tí kaffimaskinan er sambindingarliður. Bæði millum teir fýra menninar umborð; og eisini millum manningina og føstu ferðafólkini.

**Manningar hittast**
– Klaverið spælir ikki uttan kaffi, sum ein ferðamaður í messuni tekur til.

Messuprátini eru mong, men ikki long. Meðan gestir og manning leska sær á hálvskonktu krússini, verður dúgliga hugt at klokkuni. Eisini hendan ársins fyrsta várdag, tá ið manningar hittast í messuni nakrar minuttir. Føroyska flogfarið fer á flog um knappar tveir tímar, og manningin á Atlantsflogi er undir dekki og drekkur nýbryggjað lágspenningskaffi.

Soleiðis sita sjómenn, fólk í luftini og einstakir bussførarir og hugna sær eitt lítið bil, meðan tveir av manningini ganga og stákast á dekkinum.



Johan Dam, stýrimaður og skemtari.
Porkeninginum dámar væl at hugleiða um stóra heimin uttan fyri sundið:
– Tað var annað lívið, tá ið vit lógu í karibiskum havnum. Har komu lastamenninir til arbeiðis við ukulela og ghettoblastara og dansaðu limbo á keiini.
Starvstíðin hjá Johan á Strandferðsluni gongur á 14. ári.
Mynd: Jens Kristian Vang

**Eygleiðingar**
Samstarvið millum teir báðar á dekkinum, stýrimannin, Johan Dam úr Porkeri, búsitandi í Funningi og dekkaran úr Klakvík, Jógvan Syderbø er gott. Tíðin loyvir bert stuttum prátum við ferðafólkið, og tí eru setningarnir kanska av vana vorðnir greiðir og beinraknir.

– Pausur..? Tær verða brúktar til eykatúr, sigur Johan og smílist, meðan hann verður avmyndaður, veipandi eftir lastbilunum hjá Føroya Bjóri og Restorff, ið koma klikkjandi í takt, reyv í reyv umborð ferjuna.

— Tak tú bara myndir, góði. Nógvar myndir verða eisini tiknar av okkum um summarið; ja, tað er neyvan nøkur útlendsk myndabók, ið eg ikki eri í, sigur hittinorðaði porkeringurin í Funningi.



Síðani 1975 hevur Sam siglt einar 220.000 ferðir um Vestmannasund. Longdin hvønn vegin er 2,5 sjómíl. Sostatt hevur Sam siglt ein tein, ið svarar til 20 ferðir kring knøttin. Á leið ein triðingur av øllum siglandi ferðafólki í Føroyum, fer við Sam.
Mynd: Jens Kristian Vang

Eygleiðingin gongur báðar vegir. Porkeningurin hevur fragd í at meta útlendsk ferðafólk og samanbera tey við føroyingar.

– Føroyingar eru aldri í regnklæðum. Men tú sært næstan ikki útlending, uttan hann er væl bjálvaður. Tú hómar bara eyguni í teimum, so væl eru teir vavdir inn í hetta plastikkið, sigur Johan og sipar til regnklæðini.

**Farvæl og væl afturkomin**
Men hendan fyrrapartin eru eingir eyðkendir útlendingar við umborð. Kortini er ferðafólkafylgið litríkt, gevur ein sær far um tað.

Ferðafólk til flogførini eru eykend; í sløttum buksum, blonkum skóm og við nýkembdum hári. Eyguni bera brá av hesum serføroyska og álvarsama stevnufestinum, ið neyðugt er at brynja seg við, áðrenn stigið verður út í stóra heim. Onkur ekkafullur ferðamaður, ið annars starvast á opnum havi í øllum veðri, hevur fingið sær ein ráka til tess at taka broddin av ringasta ferðastikninum. Lagið er passaligt.

Ferðafólkafloymurin dregur eisini við sær onkrar longu longsulsfullar konur og forelskaðar ungdómar, ið eru komin at fylgja teimum kæru á leið vestur ígjøgnum sundið.

Tjúgu minuttir seinni, tá ið skipið fer av Oyrargjógv, er alt øvugt. Andlitini eru nýggj, men vónirnar og longsulin, ið komu til sjóndar við fráferð, hava borið ávøkst. Longu væl og virðiliga hálsfevnd, koma tey til Oyrargjáar at bíða eftir Sam. Og tey sleppa nærum ikki hvørjum øðrum í bilum, bussum ella standandi á hekkuni, meðan siglt verður fram við Svøðini, streymoyarmegin.

**Eyguni á rætta stað**
Líta tey upp ímillum mussarnar, síggja tey kanska í knokkin á Sofusi Jacobsen, skipara.

Í fyrstu atløgu tykist hesin blíðskortaði maðurin ikki serliga líkur einum skipara. Her eru ongar aksla- ella ermastrípur, ongin kaskettur.

Í dag skal Sofus leggja at einar 30 ferðir, og tá ið hann hevur lagt at fyrstu 3- 4 ferðirnar, sæst, at maðurin dugir tað, hann eigur at duga. Ongantíð sleppa mildu eygguni stavnhaldinum úr eygsjón. Hann hevur ábyrgdina av gomlu stálskútuni, og harvið verður tað. Fólk koma upp á brúnna, og skifta orð við skiparan úr Kvívík, men eygnasamband við hann er ikki við í ferðaseðlaprísinum.

**Tá ið motorarnir tagna**
Sofus hevur siglt á sundinum síðani 1982, og stendur tað til hansara, verður hann siglandi nøkur ár afturat. Spurdur um, hvat verður av skiparanum á Sam, tá ið opið verður undir sundinum, kann hann ikki bara sær:

– Er tað ikki upp á tíðina at ein verður uppsagdur..? Og man tað fara at bila, ha?. Tað rýkur úr øðrum skorsteinum, enn teimum hjá Strandferðsluni. Men eitt veit eg. Eg eri ov gamalur og skirvasligur at fara á opið hav. Kanska fylgi eg við Sam, tá ið motorarnir tagna her á sundinum, hugleiðir hann.

Alt hevur sína tíð. Men tað er við blandaðum kenslum, at Sofus hugsar um fasta sambandið.

– Var eg vágamaður, var eg glaður um fasta sambandið. Eg minnist, tá ið onki vegasamband var úr Kvívík til Havnar. Nú er onki at spikkulera upp á. Alt gongur sum eitt spæl. Eg seti meg í bilin, og løtu seinni eri eg í Havn, sigur dámligi kvívíkingurin.

Eins og maskinmeistarin umborð, veit Sofus, hvønn týdning teirra arbeiði hevur.

– Fyribils er Sam portrið til útheimin. Verður tað afturlatið, so steðgar alt upp. So hevði verið róp og levint av eini aðrari verð. Men tað hugsa vit ikki um, tí hetta er bara okkara arbeiði. Og tað riggar væl hjá okkum, tí vit arbeiða jú undir góðum og vælskipaðum umstøðum, sigur Sofus

Og væl er alt lagað. Eisini tá ið svongdin fer at gera um seg. Ongin kokkur er við, so ístaðin verður maturin borin manningini umborð, tá ið tíð er at skaffa.

Hesin steðgurin í einstáttaðu framførsluni hjá Sam er 40 minuttir langur. Tá sessast øll manningin í messuni.

Og tá ið bitarnir eru tugdir og svølgdir og tað gløðir úr fyrstu sigarettunum, léttir hugurin sær á. Farið verður at siga frá stuttligum søgum uttan úr heimi, tá ið menn vóru yngri og meira ævintýrhugaðir, enn bara til at liggja í fastari sigling um Vestmannasund. Søgurnar úr so fjarskotnum londum sum Marokko og Trinidad og Tobago eru stuttligar, og eitt kærkomið høvi at eksperimentera við eksotiskum rútmum, meðan Sam hvílir seg.

Men løtu seinni spælir Sam aftur sama lag. Við vælsignilsi frá manningini: *Darr, duggidugg, bumm*. Og enn einaferð hinvegin; *darr, duggidugg, bumm*.



Jógvan Syderbø, varin dekkari.
Spakmælti dekkarin úr Klaksvík, fortalar seg ikki.
– Onkuntíð eri eg á Leirvíksfirði, onkuntíð á Suðuroyar-firði og nú eri eg her, staðfestir hann.
Men Jógvan hevur eisini verið við trolara. Og tað hevur hann eina meining um.
– Her arbeiða vit eina viku og hava frí eina. Ein líknandi skipan átti at verið galdandi umborð á fiskiførum...
Jógvan hevur verið á Strandferðsluni í 10 ár.
Mynd: Jens Kristian Vang



Sofus Jacobsen, mildoygdur skipari:
– Øll skulu við Sam. Og øll eru eins umborð á Sam. Prominentir gestir eru ikki prominentir umborð á Sam, og tað krevja teir heldur ikki.
Hægsti maður á skútuni er eisini hin mest royndi. Í samfull 32 ár hevur hann verið strandferðslumaður; tey 18 umborð á Sam.
Mynd: Jens Kristian Vang